# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

*Administration of Occupational Safety and Health*

Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands

Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo



***Skrásetingar nr.:***

**L-C007-6**


# Leiðbeining um tjúkdarhøvlar til træsmíð

Tjúkdarhøvil skal vera væl útgjørdur og nýttur við skili, eftir reglunum í arbeiðaraverndarlógini og kunngerð um teknisk hjálpitól v.m., sum Arbeiðseftirlitið umsitur:

## ***Brúkaravegleiðing***.

Fyri allar útveganir (sølu, leigu og lán) er galdandi, at vegleiðing skal latast, sum er orðað á føroyskum ella donskum máli, við frágreiðing um nýtslu og viðlíkahald.

## ***Útbúnaður.***

Tjúkdarhøvlar skulu tryggjast soleiðis,

- at fólk minst møguligt kann koma í samband við høvulsjørn ella møgulig síðujørn o.a. útgerð,
- at trygd er fyri, at evnið ikki verður tveitt aftur,
- at framdragarin hevur sjálvstøðuga frákobling.

Hvussu vanligastu tjúkdarhøvlar eru gjørdir, sæst á strikumynd 1.

Skermurin yvir høvulsjørnunum skal røkka minst 80 mm yvir skeriringin (sí strikumynd 1) og skal verja báðar síður.

Skermurin skal hava skap sum spønhetta, við túti til útsúgving.

Møgulig síðujørn skulu vera tryggiliga fjald.

Bakkasttryggingin skal trygt virka við øllum støddum av arbeiðsevnum, eisini tá tilfar við ymiskari tjúgd og breidd verður hølvað samstundis.

Bakkasttryggingin skal hava stoppútgerð soleiðis, at ikki slepst longur fram enn til uttastu støðu.


***Lógarheimild:***

Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.
Kunngerð nr. K-E015-1 um innrætting av tekniskum hjálpartólum frá 4. september 1995.

| ***Útgivið fyrstu ferð:*** | ***Seinastu broytingar:*** |
| --- | --- |
| **21. mai 1988** | **23. januar 1996** |


Bakkasttryggingin, sum kann lyftast við handamegi, skal fara aftur í vanligu støðu beinanvegin,

tá hondin sleppur takinum.

Tjúkdarhøvil skal hava stopútgerð, sum forðar fyri at borðið kann hevjast so mikið, at tað kemur í samband við jørnini.

Hvør tjúgdarhøvil sær skal hava nullspenningsfráfall, sum forðar fyri at hann ótilætlað fer í gongd, tá streymslit ella ólag er á ljósnetinum. Innkoblingin skal vera nærindis startútbúnaðinum.

Start- og steðgiútbúnaður skal vera lætt atkomiligur.

Startútbúnaðurin skal tryggjast móti ávirkan uttanífrá. Tað kann gerast við eitt nú,
- at startknøtturin er skjúldur, yvirlokaður ella útgjørdur við kraga,
- at snúningsavbrótarin er útgjørdur við kraga uttan so at konstruktiónin forðar fyri ótilætlaðum ávirkanum.

Tjúkdarhøvlar skulu hava bremsu útgerð, um jørnini ikki steðga í mesta lagi 10 sekundir eftir at maskinan er avbrotin.

***Nýtsla***

Jørn, valsur og trýstfótur skal nágreiniliga stillast.

Arbeiðsevni skal ikki førast fram, áðrenn maskinan hevur fult snú




**Strikumynd 1**

*1. Verjuskermur*
*2. Bakkasttrygging*
*3. Stopp fyri bakkasttrygging*
*4. Framdragari*
*5. Høvulsjarn*
*6. Útdragari*
*7. Borðvalsi*
*8. Trýstfótur*

Um ólag er á maskinuni, skal framdragarin straks avbrótast.

Spønir mugu ikki takast burtur, meðan maskinan gongur.

Eru framdragarin og trýstfóturin ikki í fleiri liðum, kunnu bert tvey evni hølvast í senn.
Eru framdragarin og trýstfóturin í fleiri liðum, kunnu fleiri arbeiðsevni hølvast samstundis. Sí strikumynd 2.

Tá høvilsjørnini verða skift, skal aksilin læsast.

***Viðlíkahald***

Tjúkdarhøvlar skulu viðlíkahaldast soleiðis, at teir altíð eru í góðum standi. Àvísing um eftirlit og viðlíkahald, sum sølumaðurin letur, skal haldast.

Høvulsjørnini skulu vera hvøss og tilspenningsflaturnar reinar, áðrenn nýggj jørn verða sett í.

Bakkasttryggingin skal haldast rein.




**Strikumynd 2.**

*"A" sýnir arbeiðsháttin á deildum framdragara og trýstfóti.*

Viðlíkahald- og umvælingsarbeiði skal gerast fullgott. Orkukeldan skal takast frá, t.d. við avbrótaralykli.

***18 ára aldursmark***

Ungfólk undir 18 ár mugu ikki arbeiða við tjúkdarhøvli. Serligar reglur eru galdandi fyri lærlingar og næmingar.

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**, 21. mai 1988

Eli Davidsen, stjóri (sign.)